# Allir føringar, sum ynskja tað, eiga rætt til nøktandi og skattafíggjaða CTD kanning!

JENIS AV RANA



**Sjáldsamt og ófrættakent at lesa viðmerking landsstýrismansins í heilsumálum til undirritaða í fjølmiðlunum í gjár. At ungur vællærdur maður, ístaðin fyri virðiligt orðaskifti velur persónliga útspilling, boðar ikki frá góðum. At leggja á meg persónliga avdúkar væl einans egið hjálparloysi, tí fullvæl veit maðurin, at einki av tí, hann brigdar mær, samsvarar við veruleikan!**

Heldur enn at geva øðini rúm, átti landsstýrismaðurin at brúkt tíð at kunna vanliga føringinum, svara spurningum, ið hanga í leysari luft og tørva svar, og afturvíst ella vátta páhaldum, m.a. teimum, sum í seinastu viku vórðu at lesa í Dimmu, sett fram av serfrøði innan økið.

**Spurningar og uppáhald**
Niðanfyri loyvi eg mær at spyrja sera viðkomandi spurning, og endurgeva úr samrøðuni Dimmalætting hevði við stjóran í genfyritøkuni Amplexa.

**1:** hví sigur landsstýrismaðurin, at berarar eru frískir og tí ikki tørva kanning ella viðgerð, tá fremsti serfrøðingurin á økinum í frálíku sending sínari í Rás 2 legði dent á týdningin av at finna berarar, so hesir kunnu verða viðgjørdir? ( Og lat meg enn einaferð minna á tann einfalda veruleika, at tveir berarar kunnu fáa sjúkt barn) !

Uppáhald úr greinini, sum landsstýrismaðurin hóskandi kundi viðmerkt:

**1:** Tað eru eftir øllum at døma nógv fleiri berarar og fleiri sjúk av CTD í Føroyum enn upprunaliga hildið.

**2:** hann ( stjórin í genfyritøkuni Amplexa, har viðurkendir læknar og genetikarar virka) heldur, at heilsumyndugleikarnir eru farnir skeivan vegin runt í leitanini eftir teimum sjúku

**3:** sami stjóri metir, at 4.000 til 5.000 føroyingar eru berarar av sjúka geninum og ikki 'einans' tey umleið 2.000, sum upprunaliga hildið.

**4:** og at talið av lívshættisliga sjúkum føroyingum við sjúkuni CTD er onkra staðni millum 60 og 100 og ikki 30, sum fyrst hildið.

**5:** Leiðarin av Amplexa sigur seg hava roynt at rópa varskó fyri føroysku myndugleikunum, sum eftir hansara tykki eru farnir skeivan vegin runt í royndini at finna fram tey fólkini, sum uttan at vita tað ganga runt við einari deyðiligari sjúku.

**6:** Tey sum Amplexa hevur funnið geva eina indikatión um, at ætlanin sum fyriliggur ikki riggar. Tey hava funnið ein sjúkan sum er føddur í 1983 og tvey sjúk frá 2005, sum áttu at verið funnin við PKU carnt-in mátingunum hjá Statens Serum Institut sum eru frá 2002 . Tvs. helvtin av teimum teir hava funnið, høvdu ikki verið funnin í verandi ætlan, sigur stjórin.

**7:** Víðari ivast hann persónliga ikki í, at best hevði verið at genkannað allar føroyingar fyri CTD og hann fer enntá eitt fet longri, og heldur at allir føroyingart áttu at verið genkannaðir fyri fleiri aðrar gensjúkur, sum raka føroyingar oftari enn onnur runt heimin.

**8:** Heilsumálaráðið hevur fyribils valt at halda fast í upprunaligu ætlanini um bert at genkanna tey, sum eru beinleiðis í familju við onkran sjúkan og so annars at kanna PKU-kortini frá 1986 og fram. Ein loysn sum er óbrúkilig sambært Hans Atla Dahl, stjóra á Amplexa- og kostnaðarmikil.

**9:** Hetta er skrúan uttan enda, heldur hann fram. Fyrst eina millión krónur til Statens Serum Institut til ónýtiligar PKU kanningar, so 2,5 mió. kr. í 2010 og so 1,3 mió kr. í fleiri ár framyvir til kliniskar genetiskar kanningar, meðan Amplexa hevur bjóðað seg til at gera arbeiðið fyri Heilsumálaráðið fyri 2,7 mió. kr. fyri screeningina og við innsavning og uppfylging fyri 3,5 mió kr.

Við vón um, at landsstýrismaðurin hesaferð velur at viðmerkja og svara omanfyri- standandi heldur enn at leggja á undiritaða.

# Fólkaræðið flusnar og ferst

HØGNI HOYDAL



**Løgreglan verður umskipað uttan nakað orðaskifti ella ávirkan frá føroyskum myndugleikum. Allar avgerðir um okkara støðu mótvegis øðrum londum og altjóða samfelagnum verða tiknar av øðrum. Og okkara stjórn kappast um at leggja alla ábyrgd frá sær yvir á onnur. Vit mugu krevja fólkaræði í Føroyum, áðrenn alt seyrar burtur í heimastýrisligari undirbrotligheit**

Tjóðveldi merkir fólkaræði. Vit, fólkið í Føroyum, hava rætt til at verða javnsett við onnur fólk og fólkaræði. Vit eiga at hava ábyrgd av og ræði á øllum egnum viðurskiftum og at gera avtalur við tey, vit vilja, og taka lut í øllum altjóða samstarvi.

Hendan greiða hugsjón og hesi frælsisvirði eru í meira enn 100 ár vorðin niðurgjørd og gjørd til ræðumynd av stórum parti av politisku skipanini í Føroyum. Sambandsíhaldið hevur trúttað niður í okkum og okkara fólk, at frælsi er ikki at taka ábyrgd og hava ábyrgd av hvørjum øðrum í hesum samfelagnum og mótvegis øðrum londum. Frælsi skal ístaðin finnast í tí at sleppa undan ábyrgd. At vit ikki skulu skapa virðini sjálv og verða samhaldsføst mótvegis hvørjum øðrum. Onkur annar skal geva okkum pening og taka sær av okkara trupulleikum, framtíð og av okkara veikastu. Onkur annar skal taka avgerðirnar fyri okkum.

Og í fullum álvara bjóða fólk seg fram at verða vald á ting og í landsstýri við boðskapinum: "Atkvøð fyri mær. Eg havi ongar ætlanir um, hvussu vit skulu menna okkum og klára okkum. Men eg skal biðja Danmark um pengar og lata tey taka avgerðirnar fyri okkum. Soleiðis kunnu vit bjargast og gerast persónliga fræls við at sleppa undan at taka ábyrgd!"

**Avreiða allar avgerðir**
Hóast øll framstig í Føroyum eru hend, tá vit hava tikið ábyrgd sjálv, og allar ræðumyndir eru gjørdar til skammar, so hava vit neyvan nakrantíð havt so heimastýrisliga og undirbrotliga stjórn, sum ABC-samgonguna. Fólkaræðið seyrar bara burtur, og vit lata onnur taka avgerðirnar. Fyri bert at taka feskastu dømini:

Løgmaður sigur Føroya fólki, at vit bara megna at liva ígjøgnum kreppuna við avgerðum hjá danska Fólkatinginum um bankaviðurskifti (og sambandið vil enntá hava meira pening úr Danmark). Føroyska fólkið og vinnulívið fær ongan heiður av okkara búskaparstøðu.

Danmark fer nú undir nýggja ES-grundlóg – tann sonevnda Lissabon-sáttmálan – har eisini okkara uttanríkisviðurskifti og treytir fyri at virka í heiminum verða flutt til Brússel at gera av. Vit eru als ikki eftirspurd – og ongin ger vart við seg í landsins stjórn.

Løggáva verður sett í gildi í Føroyum – tildømis revsilóggávan, sum er beinleiðis avrit av broytingum frá Dansk Folkeparti í Danmark, ið annars hevur riggað serstakliga illa.

ES-reglur verða "yvirimplementeraðar" í føroyskum kunngerðum, so vanligt matstovu- innløgu- og vinnuligt virksemi í Føroyum, verður forðað óneyðuga.

Og øll løgreglan í Føroyum verður umskipað við einum pennastroki frá embætisfólki, ið vit ikki hava sett ella hava ávirkan av. Uttan nakað orðaskifti ella krøv frá landsins stjórn, hóast landsstýriskvinnan eftir trýst frá andstøðuni, lovaði, at onki skuldi setast í verk uttanum føroyskar myndugleikar. Nú gleðist landsstýriskvinnan bert um broytingarnar, sum í Danmark av øllum pørtum eru mettar at hava verið stórt afturstig.

Er hetta fólkaræði? Nei, fólkaræði krevur orðaskifti, innlit, ávirkan, upplýsing og veruliga ávirkan, so avgerðir ikki verða skrumblaðar omanyvir tað fólk, ið skal liva við avleiðingunum.

Vit velja fólk á ting, ið velja eitt landsstýri. Og hesi skulu standa til svars mótvegis føroyska fólkinum fyri tær avgerðir, ið ávirka okkum øll og okkara framtíð.

Men hvør kann haldast til svars, tá tey glaðbeint lata onnur, ið vit ikki hava valt, taka avgerðirnar?

Vit mugu kasta undirbrotligheitina av okkum og krevja fólkaræði í Føroyum.

# Ein tøkk til javnaðarflokkin

JOHN BERG



Vil hervið senda eina hjartans tøkk til Helenu og Javnaðarflokkin, nú tey royna at spara landinum pening í hesum sváru tíðum. Helst er tað sera skilagott at flyta ætlaða eftirskúlan úr Hvalba, tí hann var helst alt ov dýrur. Budgettið í Trongisvági kemur heilt vist at halda, tí tað plaga tílík altíð at gera.

Tit hava helst eisini í hesum sambandi havt nýggja tunnilin Hvalba - Trongisvág í huga. Nú eftirskúlin ikki verður í Hvalba, er eingin grund at gera nýggjan tunnil, so her fáa tit tvey fyri eitt - genialt.

Spardi peningurin kann ístaðin t.d. brúkast at minka um CO2 útlátið frá tykkum í Tinganesi.

Havi skilt, at á Hvítanesi skal maritima undirvísingin hjá eftirskúlanæmingunum verða. Her haldi eg, at tit hava raðfest skeivt, tí vit hava meira brim her í Hvalba, hóast vit ikki hava nakrar optimistjollur. Hóast ongar optimistjollur, eru vit í Hvalba optimistar og vænta, at tit til næsta val koma og bjóða okkum okkurt, sum verður nógv áhugaverdari enn ein eftirskúli, tí vit vita, at tit elska okkara vøkru bygd Hvalba, tað hava tit so ofta víst bæði í talu og skrift.

Eisini er at gleðast um, at vakra umhvørvið, har eftirskúlin skuldi byggjast ikki varð oyðilagt.

Vil samstundis eisini rósa bygdarráðnum í Hvalba fyri teirra forstáilsi fyri sparingum javnarfloksins.